# Tá ið sjórænari skar brós

**Skiparanum hóvaði ikki illgerðina, sum ein av monnum hansara hevði framt. Tá hann kom umborð aftur, varð hann bukaður til deyðis, kastaður í havið og rak á land í Nólsoy, har hann liggur grivin. Skiparin sendi eina krukku við salvu í land til at grøða konuna, men tað hjálpti einki, og konan doyði. Í nøkur hundrað ár var krukkan í Gortrastovu í Nólsoy, har hendingin fór fram, men fyrst í farnu øld endaði hon á danska tjóðsavninum, har hon hevur verið í varðveitslu seinastu 100 árini. Krukkan, sum stavar frá hesi eirindaleysu hending, er nú komin aftur til Føroya**



SJÓRÆNARAR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroyar vórðu nógv herjaðar av útlendskum sjórænarum í gomlum døgum, og soleiðis var eisini Nólsoyggin fyri ráni – og tí sum verri var.

Søgnin sigur, at tíðliga ein summarmorgun læt eitt stórt fransaskip akkerið falla á Nólsoyarvík. Fjáltur kom á fólk, og tey ánaðu, at her var talan um eitt ránsmannaskip. Eingin ivi var um tað. Nógv fólk flýddu úr bygdini við tí, tey áttu og kundu bera og hildu leiðina til fjals. Men onkur var verandi eftir í bygdini.

Ránsmenninir komu í land og byrjaðu at ræna. Teir flestu fóru í hagan at ræna neyt og seyð. Aðrir rændu í bygdini.

Umsíður høvdu teir fingið fatur á øllum neytunum í Nólsoy og høvdu rikið tey oman í fjøruna, har tey vórðu dripin og førd umborð á skipið. Tá ið ránið hasaði av, var bert ein kvíga eftir í oynni, sum teir ikki høvdu funnið. Staðið, har hon hevði krógvað seg fyri ófriðakroppunum, góvu nólsoyingar navnið, Loynikovin, og soleiðis er staðarnavnið enn tann dag í dag.

Hendan dagin krógvaðu nógvir nólsoyingar seg í Gomlugørðum, sum er ein rók, ið gongur gjøgnum bergið eystan fyri á Nólsoynni. Tey høvdu borið nógv grót til sín, og her sótu tey og hugdu at, meðan fransarnir rændu undir í neðra. Tá ið teir flestu sjórænararnir vóru rýmdir, settist ein av teimum at lata seg úr klæðunum. Søgnin sigur, at hann settist at leita sær eftir lúsum.

Best, sum hann soleiðis situr, fer grót at rulla úr homrunum fyri oman; tað vóru nólsoyingar, sum grýttu grót omanyvir teir. Sjórænarin sá, at hann mátti til beins við sín bera kropp. Tá ið hann var farin, leyp ein nólsoyingur niður úr rókini og oman, har maðurin hevði sitið og tók bæði byrsu og klæðini, sum maðurin var rýmdur frá.

Henda byrsa, sum verður rópt klæmintsbyrsa eftir manninum, sum fann hana, er enn til skjals í Nólsoy, og var í mong ár í húsunum í Búð.

Tá ið vit vóru skúlabørn í Nólsoy, høvdu vit nakrar ferðir høvi at síggja klæmintsbyrsu.



*Her – undir steininum fremst á myndini – sigur søgnin, at sjórænarin liggur grivin, eftir at hann varð bukaður til deyðis umborð og tveittur í havið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Skar bróstini av konu

Ein av sjórænarunum, sum rændu í bygdini hendan dagin, var komin inn í Gortrastovu, sum er norðrasta húsið í niðastu lon í dag. Har helt maðurin alt húsið í einum ruðulleika. Eingin var inni uttan konan.

Sjórænarin legðist á eina kistu, sum stóð har á gólvinum. Men kistan var løst. Hann kravdi at fáa lykilin frá konuni, og hon formáddi sær ikki nógv ímóti hesum ránsmanni – og gav honum tískil lykilin. Hann læsti kistuna upp og legðist á knæ frammanfyri henni og fór at róta í henni. Sjórænarin tók ein lutin fyri og annan eftir upp úr kistuni. At enda tók hann eitt gullbikar upp, men tá kundi konan ikki bara sær longur; hon tók undir kistulokið og ripaði tað aftur í skallan á manninum, sum lá frammanfyri. So hart ripaði hon lokið, at hann svímaði.

Konan tók nú gullbikarið og leyp av durum í eitt skot nakað omanfyri húsini at krógva seg. Men ólukkutíð hevði hon stokkar við sær í hondini og misti noðað niður á gólvið, áðrenn hon slapp út. Í rokanum ansaði hon ikki eftir, at noðað lá eftir.

Tá ið sjórænarin vaknaði aftur, sá hann einki til konuna, men hann sá noðað liggja á gólvinum! Hann lesir seg eftir tráðnum niðan í skotið, har konan stóð. Sjórænarin tók tá gullbikarið frá konuni, fór illa við henni. At enda skar hann bæði bróstini av konuni og rýmdi.

Tá ið maðurin kom umborð aftur, og skiparin frætti um brotsgerðina, gjørdist hann so illur, at hann læt mannin binda til mastrina og læt hann buka til deyðis. Síðan varð maðurin kastaður í havið og rak á land úti í Seiðagjógv í Nólsoy, sum liggur skamt uttan fyri bygdina.

Dagin eftir funnu nólsoyingar mannin, tóku hann niðanfrá og gróvu hann í bønum, beint oman fyri gjónna. Teir løgdu ein stóran stein á grøvina, og hesin steinur og hetta stað rópa nólsoyingar enn úti á Fransinum.

Steinurin liggur beint á gøtuni, tá ið tú gongur omanfyri Seiðagjógv. Sum smádreingir plagdu vit at stýga á steinin og spýta á hann, tá ið vit gingu framvið. Hetta gjørdu vit, tí søgan segði, at her lá ein maður, sum hevði gjørt seg inn á eina konu í bygd-